# Fæst nú kring landið





kr. 130,-

# ítróttur

Nr. 245 • mikudagur • 19. desember 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Stjørnukvinnur sum veggjaprýði



*Tríggjar av stjørnunum í nýggja kalendaranum, Davina, Agne og Beinta, tá stjørnukvinnurnar signeraðu nýggja kalendaran fríggjadagin*

*Mynd: Alexandar Djorovic*

**Kvinnuligir hondbóltsspælarar í Klaksvík prýða nýggjan kalendara fyri 2002**

Nú ber til at hanga hondbóltskvinnurnar hjá Stjørnuni upp á veggin.

Ítróttarhandilin Innkast í Klaksvík hevur staðið fyri at gera Stjørnukalendaran, har spælararnir á besta kvinnuliðnum hjá Stjørnuni eru avmyndaðir í øðrvísi støðum.

Myndirnar eru tiknar, so tær passa árstíðunum, og nógvar av myndunum eru tiknar úti í náttúruni.

– Ætlanin við kalendaranum er bæði at gera meira vart við okkum sjálvi og eisini at fáa Stjørnuni meira fram, sigur Hervør Eyðunsdóttir, sum rekur Innkast.

– Nógv fólk eru vanliga til dystirnar hjá Stjørnuni, men vit halda ikki, at tær fáa ta viðurkenning, sum tær hava uppiborið. Hesin kalendarin kann vónandi bøta eitt sindur upp á tað, sigur hon.

Nýggi kalendarin fæst til keyps í Innkasti.

**ek**

# Hoyvík móti oddinum

**Talan kann væl gerast um ein sera spennandi dyst, tá hoyvíkingar taka ímóti VÍF**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Ein dystur verður í besti mansdeildini í kvøld,. mikukvøldið.

Hoyvíkingar fara tá at taka ímóti føroyameistarunum og oddaliðnum úr Vestmanna, og nógv bendir á, at vit her kunnu fáa ein rættiliga spennandi dyst.

Í løtuni eru hoyvíkingar á triðja plássinum í landskappingini, og sjálvsagt hava teir einki ímóti at konsolidera hesa støðu, áðrenn farið verður í ein stuttan vetrarsteðg.

Hoyvíkingarnir eru tó sjálvandi ikki teir einastu, sum vilja hava stig burtur úr dystinum. Við einum sigri styrkir VÍF um oddastøðuna hjá sær, men lætt verður tað neyvan. Júst hesin dysturin hevur seinnu árini aloftast verið sera javnur, og eitt nú var um reppið, at hoyvíkingar í fjør koppaðu VÍF, hóast munurin á stigatalvuni var stórur um tað mundi. Nú tykjast hoyvíkingar at vera væl betri fyri, enn teir vóru í fjør, og spurningurin er so, um tað er nóg mikið at koppa VÍF.

Dysturin verður í Høllini á Hálsi í Havn kl. 20.00.

# Oddadysturin bíðar

**Útsetti dysturin millum VÍF og Neistan verður ikki leiktur fyrr enn eftir nýggjár**

Upprunaliga ætlaði Hondbóltssambandið annars at royna, at fáa dystin avgreiddan fyri nýggjár. Mánakvøldið varð støða eisini tikin um, at flyta dystin, H71-VÍF, so oddadysturin kundi verða mikukvøldið, men seinni varð hetta tó broytt.

Dysturin er nú ásettur at verða leiktur 9. januar. T.v.s. eftir at fyrstu dystirnir í grundspælinum eru leiktir.

**-jm**

# Ein góð vika

**Súni Olsen og FC Zwolle hava havt eina góða viku, sum hevur lyft teir fýra pláss upp á stigatalvuni**

HOLLAND
*Jákup Mørk*

Gongdin hevur annars ikki verið so góð hjá liðnum, sum hevur ætlað sær at bjóða av um uppflytingarsessin. Eftir eina góða byrjan, har Zwolle vann dyst eftir dyst, kom brádliga stígur í, og fyri einari viku síðani var liðið at finna á sjeynda plássinum.

Sjálvt á heimasíðuni hjá felagnum, www.fczwolle.nl, tóktust menn at hava mist móti, og millum annað varð skrivað, at nú var Excelsoir longu farið avstað við fremsta plássinum. Kappingin er tó sum kunnugt drúgv, og nú tykist aftur at bragdað hjá Súna og teimum.

Zwolle var nevnliga einasta liðið í oddinum, sum fekk fulla úrtøku um vikuskiftið. Tað var tepurt, men við einum máli í fyrra hálvleiki vunnu teir 1-0 ímóti MVV, og tá øll hini mistu stig, inniber sigurin, at Zwolle á triðja plássinum nú bert er fimm stig aftan fyri oddaliðið, Excelsoir.

Súni Olsen kom á vøllin seinastu 10 minuttirnar, og hevur hann nú leikt níggju dystir hetta kappingarárið. Í fjør leikti Súni bert við í átta dystum, so tað gongur í øllum førum stútt framá hjá gøtumanninum.

# Hull misti

Í Onglandi gekst einki serligt hjá Julian og teimum í Hull City um vikuskiftið.

Teir spældu á útivølli móti Scunthorpe, og úrslitið gjørdist, at Hull tapti dystin 2-1.

Eftir ein tíma fekk Hull mann riknan av vølli fyri eina ógvusliga takling, har leikarin hjá heimaliðnum breyt beinið. Støðan var tá longu 2-0, men fimm minuttir eftirat liðið varð skert, minkaði Hull um munin, tó at hetta munaði lítið, tá samanum kom.

Hull er nú á fjórða plássinum í ensku triðju deild. Tvey stig eru upp til annað-plássið, sum ber beinleiðis uppflytan við sær.

**-jm**